

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 11 - 2011

# BP skal hava super-pall

BP er farið undir at hyggja seg um fyri at vita, hvør er førur fyri at byggja felagnum ein pall, sum kann lúka øll krøv, sum felagið setir. Sum skilst ætlar bretska felagið at byggja ein veruligan super-pall, sum skal tola alt veður, og sambært offshore.no stendur tað ikki á at fáa pallin bygdan. Sagt verður, at eitt nú hava Seadrill, Odfjell og Fred. Olsen sagt seg vera til reiðar. Talsmaðurin hjá BP, Jan Erik Geirmo, sigur við offshore.no, at felagið kannar møguleikarnar fyri at byggja ein pall, sum kann arbeiða á krevjandi havleiðum, og sum kann brúkast í bretskum og norskum øki. Mett verður, at tað fer at kosta góðar tríggjar milliardir norskar krónur at byggja ein tílíkan pall. BP er ikki tað fyrsta oljufelagið, sum fær sær pallar, ið kunnu arbeiða í at kalla øllum líkindum. Í summar boðaði Statoil frá, at felagið hevði bílagt tveir pallar, sum eru skræddaraseymaðir til norskt øki. Pallarnir, sum verða bygdir hjá Songa Offshore, verða eftir ætlanini lidnir í 2014. Statoil skal so leiga teir frá Songa Offshore í átta ár fyri 13 milliardir norskar krónur.